

## Forvitnislig list

**- Nógv fólk hava vitjað framsýningina, og eg vóni at síggja nógv fólk aftrat, áðrenn framsýningin letur aftur mikudagin, sigur Lisbeth Mortensen, listarkvinna**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Havnarkonan, Lisbeth Mortensen, sum eftir fleiri ára útlegd í Danmark, nú er aftur í Føroyum við forvitnisligari listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík, er væl nøgd við undirtøkuna, sum framsýningin higartil hevur fingið.

- Jú, her hava nógv fólk vitjað, og eg vóni at síggja nógv fólk aftrat, áðrenn framsýningin letur aftur mikudagin um 14-tíðina, sigur hon.

Við á framsýningini hevur hon málningar og skulpturar, og millum málningarnar eru einar 10 við føroyskum motivi.

- Fólk, sum hava verið inni á gólvinum, hava undrast yvir, at føroyamyndirnar eru so ljósar. Tey halda listina vera forvitnisliga og nýskapandi, sigur Lisbeth, sum hevur sand úr Sandágerði við á øllum føroyamyndunum.

Sandin, sum hon hevur arbeitt við, fekk hon vinfólk í Føroyum at taka í Sandágerði og senda sær niður til Danmarkar.

Sjálv flutti Lisbeth, sum er ættað úr Havn, til Danmarkar at búgva í 1992 og hevur bert fáar ferðir vitjað í Føroyum aftur.

- Men framsýningin fevnir um meira enn føroyamyndirnar, leggur hon dent á.

Hon ger eisini skulpturar úr ymiskum tilfari, og hon málar bæði við oljumáling, vatnlitum (akvarel) og ger oljukritstekningar – og motivini eru rættiliga fjølbroytt.

Lisbeth Mortensen hevur málað málningar úr Indiu, sum eru prentaðir til postkort, har peningurin fyri søluna fer til børn í Norðurindiu. Hon stuðlar International Børnehjælp og verða á framsýningunum í Føroyum ymiskir lutir seldir til frama fyri hesi børn.

Meira kann lesast um Lisbeth Mortensen á www.lisbethmortensen.dk

# Viðskiftafólk størri frælsi og rásarúm við DJ-láni

**- Við nýggja tilboðnum kunnu fólk biðja um gjaldsskáa upp til tveir mánaðir um árið, um tey ætla sær at brúka peningin til okkurt annað. Talan kann vera um at fullføra ein dreym – ella um at fáa størri fíggjarligt rásarúm í húsarhaldinum, sigur stjórin í Suðuroyar Sparikassa, Søren L. Bruhn.**

TILBOÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*- Hetta er eitt nýtt tilboð, sum vit sjálvir hava uppfunnið, sigur stjórin í Suðuroyar Sparikassa, Søren L. Bruhn*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Suðuroyar Sparikassi bjóðar nú sínum verandi og komandi viðskiftafólkum eitt nýtt lánitilboð, eitt sonevnt DJ-lán.

- Navnið DJ sipar til mánaðirnar desember og juni, men viðskiftafólk kunnu sjálvandi velja aðrar mánaðir at skapa sær fíggjarligt rásarúm.

Nýggja tilboðið hjá Suðuroyar Sparikassa er "orginalt" á tann hátt, at hetta er nakað, sum sparikassin hevur funnið upp á sjálvur.

- Hetta er ikki eitt "kopi" av nøkrum, sum aðrir hava, hvørki her heima ella uttanlands.

DJ lán verður veitt sum annuitetslán við veð í fastari ogn.

- Annuitetslán eru eyðkend við einum føstum mánaðarligum gjaldi, sum verður ásett við støði í lánsupphædd, afturgjaldstíð og rentu.

Suðuroyar Sparikassi sigur, at verður eitt vanligt 20 ára annuitetslán lagt um til eitt DJ-lán, verður mánaðarliga gjaldið sum meginregla tað sama fyri DJ-lánið, sum fyri vanliga annuitetslánið.

- Fólk kunnu biðja um gjaldsskáa upp til tveir mánaðir um árið, um tey ætla sær at brúka peningin til okkurt annað. Talan kann verða um at fullføra ein dreym um eina summarfrí, vetrarfrí, um ein nýggjan bil – ella bara um størri fíggjarligt rásarúm í húsarhaldinum, sigur stjórin í Suðuroyar Sparikassa, Søren L. Bruhn.

### Størri frælsi

Mánadagin skipaði Suðuroyar Sparikassi fyri tíðindafundi um nýggja tilboðið.

- Tilboðið byggir á, at viðskiftafólk við DJ-láninum kunnu fáa upp til tveir avdráttarfríir mánaðir um árið - eftir egnum ynski. Um fólk ynskja tað, kunnu avdráttarfríu mánaðirnar sparast upp, soleiðis at tú kanst fáa fleiri mánaðir í einum ári – ella yvir nøkur ár, sigur Søren.

Á tíðindafundinum vísti hann á, at við DJ-láninum verður afturgjaldstíðin longd í mun til eitt vanligt annuitetslán við í minsta lagi talinum av avdráttarfríum mánaðum.

- Talan er sostatt um, at peningurin verður læntur í eitt longri tíðarskeið - og at restskuldin ikki lækkar eins skjótt, sum av "vanligum" lánum, sigur Søren L. Bruhn.

Á tíðindafundinum var eitt dømi tikið fram um eitt DJ-lán, sum er tikið yvir 20 ár.

Um lántakarar brúka gjaldsskáan upp á tveir mánaðir um árið "fult út", fær lántakarin gjaldsskáa í tilsamans 54 mánaðir, men tá verður so lánstíðin eisini tilsamans 26 ár og 7 mánaðir – í staðin fyri tey upprunaliga 20 árini.

- Hetta verður gjørt fyri at geva lánstakaranum størri frælsi – og fyri at gera tað lættari, um lánstakarin hevur brúk fyri gjaldsskáa, sigur Suðuroyar Sparikassi um nýggja tilboðið.

# Tjørnuvíkingar fara í Stakkin leygardagin

STAKSDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Komandi leygardag fara tjørnuvíkingar í Stakkin. Dagurin byrjar við, at menn samlast við bygdahúsið klokkan 7.30, og tá plaga nógv bygdafólk at koma oman at heilsa upp á fjallmenninar og syngja.

Hetta er ein hátíðardagur í Tjørnuvík.

Áðrenn farið verður til gongu, bjóðar formaðurin, Jógvan Magnussen, vælkomin, og síðan verða trý ørindi av sálminum, "Lít allar tínar leiðir", sungin.

Vanliga telir fjallmanningin einar 40 mans.

- Hendan dagin kemur altíð nógv fólk til bygdar, og ofta koma avbygdamenn við út á Stakkin. Túrurin er ikki langur. Tað er bratt, men vælgongt. Túrurin heimaftur við seyðinum er heldur longri.

Jógvan sigur, at vanliga verður komið heimaftur um middagsleitið, og tá verður eitt takkarørindi sungið.

- Tá plaga fólk at vera forvitin, skimast eftir skurðinum, og okkurt kríatúrið verður "handlað", sum hann tekur til.



### Uppboðssøla

Eftir heimkomuna verður boðið til døgurða í bygdarhúsinum, og tá ið etið er, verður farið at fletta.

Jógvan veit at siga, at í ár eru 16 seyðir at taka í Stakkinum, seks ár, átta lomb (fimm veðurlomb og trý gimburlomb) og tveir veðrar.

- Av hesum verða eini fýra lomb flett upp, sundurlimað og seld á uppboði í stykkjum.

Formaðurin sigur, at lundatíðin royndist ikki væl í summar, men 70 grýtuklárir lundar verða við á uppboðnum.

- Seyður og lundar verða seld á uppboði klokkan 17, og seinasta ár gav sølan stívliga 70.000 krónur.

Hann sigur, at um avbygdarmenn keypa livandi seyð, fletta staksmenninir fegnir hendan seyðin beinanvegin.

### Tombola

Eins og í fjør, skipar Kingo -bólkurin fyri tombola í bygdahúsinum beint eftir aktiónina, har eitt nú fesk tjógv, karamellur, sodavatn og annað verður at vinna.

- Í fjør vóru eini 150-200 fólk til tiltakið niðri í Túni – og vit vænta aftur nógv fólk hesaferð, sigur Jógvan Magnussen.

Staksdagurin hevur altíð verið tann stóri dagurin í Tjørnuvík; fólk eru í góðum lag, og kvøldið endar við dansi í bygdahúsinum.

Leygarkvøldið verður tað Bridge, sum fara at spæla til dansin.